# Føroyar eru eitt

**Tvær ungar finnlandssvenskar gentur hava verið í starvsvenjing á Sosialinum í tvær vikur. Vit hava práta við tær um Føroyar, Finnland og javnstøðu**



Sosialurin

## Samrøða




**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo


Tað norðurlendska samstarvið riggar eisini fyri tann norðurlendska ungdómin. Norðurlandaráðið setti í verk eina skipan fyri nøkrum árum síðani. Henda skipanin nevnist "NordPlus Junior", og ger hon tað møguligt hjá norðurlendskum lesandi ungdómum at fara til onnur norðanlond í styttri tíðarskeið í lestrar og útbúgvingarhøpi. Studenta og HF-skeiðið á Kambsdali hevur gjørt sær dælt av hesum. Tvær finskar gentur – ella rættari sagt: finnlandssvenskar gentur – tí tær hoyra til tey uml. 300.000 fólkini í Finnlandi, sum hava finskt, sum sítt móðurmál, hava tikið av møguleikanum, sum NordPlus Junior gevur. Marika Hill og Caroline Erichson – Caroline er av álendskari ætt – hava verið í Føroyum í tríggjar vikur, tær fóru heim til Finnlands í morgun. Tvær tær síðstu vikurnar í Føroyum vóru tær í starvsvenjing á Sosialinum.

### Føroyingar eru við uppá tað

Marika og Caroline meta Føroyar verða eitt sera gott myndaland. Jens Kristian Vang, myndamaður á Sosialinum hevur verið runt og víst teimum vakrastu støðini á meginøkinum. Hæddarpunktið – bæði so og so – var tá tær sóu oyggjarnar klæddar í kavaskrúð uppi á Sornfelli, nú týsdagin. Marika, sum er tann meiri ídna, tá tað kemur til myndatøkur, tók 114 myndir bara henda dagin.

- Her er nógv góð motiv, bæði í Tórshavn, og kring oyggjarnar. Tað er stuttligt at taka mynd av smádreingjum her. Í Finnlandi flýggja teir yvir háls og herðar, tá ein ætlar at taka mynd av teimum. Her í Føroyum smírast smádreingirnir um alt fimmoyra, teir flenna og "posera" fyri okkum, so vit kunnu fáa tær bestu myndirnar av teimum, sigur Marika hugtikin. Tær vilja gjarna koma aftur til Føroya okkurt summari, tá oyggjarnar eru uppá tað besta og grønasta.

- Føroyar eru eitt land, sum ein eigur at vitja minst einaferð í lívinum!, undirstrikar Caroline. Tær vistu lítið um Føroyar, nóg illa hvar tær lógu á kortinum, og at lundi hevur heima í Føroyum. Caroline "Googlaði" seg fram til tað, sum hon kundi finna um Føroyar, meðan Marika valdi at koma til Føroyar ófyrireikað. Tær hava gjørt myndareportasjur um millum annað skúlamatin á Handilsskúlanum í Marknagili, og hava verið úti við blaðfólkunum, og vilja viðmæla øðrum at gera eina líknandi ferð, sum tær júst hava gjørt. Tað hevur stórt sæð gingið væl at samskifta, og dáma teimum væl, at føroyingar práta "gøtudanskt", sum er væl lættari hjá teimum at skilja, enn vanligt danskt við danskari úttalu.

### Javnstøðan hevur tað gott í Finnlandi

Finnland hevur kvinnuligan forseta – Tarja Hallonen – og stórur partur av teimum, sum sita í stjórnini og ríkisdegnum eru eisini kvinnur. Marika og Caroline siga, at nú á døgum verður ikki nortið so ræðuliga nógv við javnstøðu í Finnlandi, javnstøðan er ein natúrligur partur av gerandisdegnum.